Ummæli av konsertini »Vælskapt brek«

Eitt upplivilsi fyri øll

Ta› byrja›i vi› at nøkur fá fólk vi› sama áhugamáli og tørvi møttust fyri uml. einum ári sí›ani og avtala›u at gera eitthvørt munagott tiltak teimum breka›u í Føroyum at bata, og leygarkvøldi› enda›i so alt strí›i› og strevi› vi› eini sera gó›ari konsertframførslu, har 15 ymiskir sangir av fløguni vi› sama heiti vóru framførdir. At vera uppi í Nor›urlandahúsinum hetta kvøldi›, var sum at njóta alt ta› gó›a eitt vældekka› bor› hevur at bjó›a.

Tey breka›u í Føroyum hava sín egna felagsskap, sum kallast MBF – Meginfelag teirra breka›u í Føroyum. Ein áhugabólkur innan felagi› setti sær fyri at gera naka› munagott fíggjarligt íkast, solei›is at kor teirra breka›u kunnu gerast enn betri, eins og ta› at gera almenna samfelagi› Føroyar sum heild meira vaki›, tá ta› vi›víkur vi›urskiftunum hjá teimum breka›u. Ta› stó› ikki á at fáa ein høvu›sstu›ul og innkomu yvir 80 uppskot til sangkappingina, i› var› útskriva›. Alt hetta rúgvusmikla tilfar var› vi›gjørt og tríggir vinnarar funnir, eins og avtala› var› at geva eina fløgu út vi› 19 av hesum uppskotum.

Ta› er inki at ivast í, at ta› hevur veri› eitt ótrúliga stórt arbei›i at fáa alt hetta uppá pláss, tá hugsa› ver›ur um allar teir smálutir, i› eru í slíkum tiltaki, men sigast má, at hesum komu tit væl frá. Ta› er í einum slíkum ummæli ikki lætt at vi›gera hvønn einkultan sang, men fái eg bert givi› eitt heildarinntrykk.

Ta› er at fegnast um, at vit í Føroyum hava so nógv skapandi fólk, bæ›i til at yrkja sangir, skriva løg og ikki minst at fáa rætta tónleikin fram, tí ein sangur er eins og ein mála› mynd, har tann, i› skapar hevur alt at siga. Vi› sanginum er eitt sindur ør›vísi, tí vi›hvørt ger sangskrivarin lagi› sjálvur, eins og skapar tónleikin eisini, men vi›hvørt er ta› onkur annar, i› skrivar lagi› og onkur heilt annar, i› letur alt hetta í tónleikin. Solei›is er vi› hesi fløguútgávu, har alt er sera væl eydna›, har vit, i› lurta nú bert kunnu njóta lidna úrsliti› og sita eftir vi› eini kenslu av fullum nøgdsemi. At so fáa hetta framført »live« er so aftur ein annar lutur, og her er bara at siga, at kvøldi› sum heild eydna›ist sera væl.

Jákup Magnussen, útvarpsma›ur, tók sær av at vera frásøguma›ur og l‡sti sangirnar væl og vir›liga, eins og vit fingu eitt sindur meir at vita um tey ymisku, i› sungu. Snildisliga var ein stamma av grundtónleiki, t.v.s. Kim Hansen á tangentum, James Olsen á trummu, Jóhannus á Rógvu Joensen á bassi og Ólavur Øster á guitarum. Ta› sást og hoyrdist, at hesir dugdu tilfari› til lítar og bóru teir øllum væl uppi. Harumframt komu so onnur ljó›føri, sum tey ymsu n‡ttu, tá tey sungu og tá dugdu hesir eisini at tillaga sín tónleik, so ta› passa›i væl saman. Vi›hvørt var ney›ugt vi› innspældum tónleiki, tá i› m.a. genturnar Esther og Tjó›hildur sungu teirra sang. Danin Anders Ørsager n‡tti eisini sjálvan rytmupartin sum playback, men annars spældu tónleikararnir til. Eitt anna›, sum var sera heppi› var, at Anna D. Háberg og Sanna á Borg sungu kórrøddir til tær ymsu framførslurnar.

Øll konsertin var annars væl stu›la› av ø›rum stu›lum, og alt hetta gjørdi, at ta›, i› framført var›, gjørdist sera hugnaligt. Heimkomin mátti eg rættuliga seta meg ni›ur og fáa sodna› alt hetta, i› framført var›. At vit eiga gott fólk í Føroyum innan tónlistarliga øki› er eingin ivi um. Nú er so bara at vóna, at ta› vera mong, i› vilja ogna sær fløguna, tí her er mangt og gott forkunnugt tilfar at njóta. Fløgan vil koma at vera ein var›i á einihvørji fløguhill. Samstundis er eisini at vóna, at vit onnur, i› hava okkara fulla førleika vilja geva okkara breka›u størri ans í framtí›ini. Ta› er at ynskja at alt almenna samfelagi› Føroyar tillagar bygningar og anna› umhvørvi til tey breka›u. Enn er langt á mál, men eina fer› enn er áminningin send út. Ta› ber heldur ikki til framhaldandi at siga, at enn er langt eftir á mál, tí hetta vi› umstø›unum hjá teimum breka›u hevur veri› frammi í mong ár nú eftirhondini, so máli› eigur í hvussu so er at vera í eygsjón nú.

Vi› hesum or›um vil eg ynskja MBF og ÍSB hjartaliga tillukku vi› útgávuni fløguni sum heild og tiltakinum annars. Eg havi í hvussu so er noti› gott av fløguni, og ikki minst leygarkvøldi› gav mær og mínum eitt minnisríkt upplivilsi. At dóttir okkara Laila fekk høvi› at syngja vinnaralagi› »Anna› bo›« sum »stand in« fyri Lenu Anderssen, takka vit hjartaliga fyri. Hon tók hetta sum eina avbjó›ing og vónandi eru tit nøgd vi› úrsliti›. Vit hoyrast eina a›ru fer›.

Victor Carlsen

Sigri› Sivertsen

Kim Hansen

Eivør Pálsdóttir



Pætur vi› Keldu

Anna D. Háberg og Sanna á Borg saman vi› Leif Anderssen sungu kór

Laila Carlsen



Ronnie Nielsen

Eftir konsertina handa›i Jóhan í Ni›ristovu, umbo› fyri fyrireikingarbólkin Bartal Kass, umbo› fyri Føroya Lívstrygging eitt blómutyssi

Eftir at konsertin var li›ug og áhoyrararnir saman vi› sangarunum høvdu sungi› felagssangin »Fagra blóma« góvu sangararnir teimum sum sótu í fremstu rø› eina blómu hvør. Her er ta› Tóra vi› Keldu sum handar Sóley Sivertsen eina blómu



Jógvan Hansen